FÁA TYGUM IKKI BLAÐIÐ — TOSIÐ SO VIÐ POSTAVGREIÐSLUNA

SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

NR. 32

LEYGARDAGIN 26. APRÍL 1969

42. ÁRG.

Landsstýrið mátti dvína fyri læruráðnum!

Javnaðarflokkurin og triggir tjóðveldismenn atkvøddu fyri landsstýrisuppskotinum um hækkan av lærlingalønini, ið sostatt varð felt

Ístaðin varð uppskotið frá tí víðkaða læruráðnum samtykt, ið bert gevur lærlingunum, hesum lítið lønta stætti í samfelagnum, eina stokkuta hjálp

Eftir áheitan av landsstýrinum hevur víðkaða læruráðið havt spurningin um lærlingalønina til viðgerðar.

Samtykt varð við 3 atkvøðum móti 2 fylgjandi uppskot um nýggjar lønir og lærutíðir:

MINSTALØNIN VERÐUR HENDA:

1. árið 15 % av gald. sveinal.
2. árið 20 % av gald. sveinal.
3. árið 25 % av gald. sveinal.
4. árið 33 1/3 % av gald. sveinal.

Í sáttmálanum verður tilskilað, at lønin ongatíð má vera minni enn tann til eina og hvørja tíð fyrisetta minstaløn.

LÆRUTÍÐIN:

Lærutíðin verður 4 ár, skúlatíðin viðroknast. Í sveisarafakinum verður lærutíðin tó framvegis 2 ár + 3 mánaðir.

Læruráðið heldur seg ikki hava heimild at broyta galdandi sáttmálar og hækkaða lønin og stytta lærutíðin verður tí bert galdandi fyri nýggjar sáttmálar.

Broytingarnar verða settar í gildi beinanvegin, um tingið ikki ásetur lønirnar við lóg.

Uppskotið gevur lærlingum ein lønarbata tey 4 læruárini uppá tilsamans kr. 7.993,96. Styttingin av lærutíðini við 21 vikur gevur ein lønarfyrimun uppá kr. 6.242.77 (Sveinaløn ÷ lærlingaløn 37½ pst.)

Handverksmeistaraumboðini ynskja at viðmerkja, at teir hava tikið undir við omanfyri nevnda uppskoti fyri at lønarásetingin framvegis skal vera hjá læruráðnum og fyri at fáa meiriluta fyri einum uppskoti. Eina hækking av lønini, sum av landsstýrinum skotið upp, halda teir verður til óbótaligan skaða fyri handverkið sum heild, tí tilgongdin av lærlingum óivað vil minka niður í heilt lítið, um ikki meistarar halda heilt uppat við at taka lærlingar.

Umboðini fyri handverkarar føra fram, at tað bert er spurningurin um lærlingalønina, sum nú er til viðgerðar á tingi, sum ráðið er biðið um og fyrireika at taka støðu til. Lærusáttmálarnir, sum eru í gildi, koma ikki at fáa nakrar sømdir við frammanfyri nevnda uppskoti, men kemur hetta at skapa ójavna í lønini og harav misnøgd millum tey, sum eru í læru. Umboðini fyri Føroya Handverkarafeløg mæla tí til, at uppskotið frá landsstýrinum, sum meirilutin í lógarnevndini er samdur um, verður viðtikið óbroytt.

GUDSTÆNASTA

Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, hevur í morgin gudstænastu í Hvannasundi kl. 12 og á Viðareiði kl. 18.

FLAGGIÐ

Friggjadagin 25. apríl halda vit flaggdag okkara. At hesin dagur verður hildin sum flaggdagur, kemur av tí, at tað var júst henda dagin — 25. apríl 1940 — at Bretar kunngjørdu á mongum málum í útvarpum sínum, at føroysk skip skuldu nýta tað føroyska flaggið, og vit vita, at sjómenn okkara gjørdust sera góðir við flagg sítt. Tað minti teir dagliga um landið, teir í hesum vandatíðum váðaðu alt fyri, tað var fyri teimum eitt symbol fyri Føroyar. Og sum vit vita, vóru nógvir av teimum, sum ikki bóru boð í by, og er tað hugsandi, at tað við hvørt hevur verið tað seinasta, teir hava sæð av teirra søkkandi skipi.

Men flaggið hevur sanniliga eisini veitrað í gleðisløtum eins væl og tað hevur í tungum løtum.

At eiga eitt savningarmerki forpliktar. Vit eiga at virða tað hátt og duga flaggsið m. a. við at halda flaggtíðirnar, soleiðis at tað ikki hendir, at flaggið hongur og sleingist uppi í stong ini eftir sólsetur.

Í ár eru 50 ár liðin síðani krossmerkið varð vundið á stong í Føroyum. Frammanundan høvdu vit fyrst veðraflaggið og síðani tjaldursflaggið, men hesi vístu mest sum bert inneftir.

Tá ið vit so fáa krossmerkið, tað hvíta merkið við reyðum blárandaðum krossi, verður øðrvísi, tí nú vóru vit nærri skyld við hini Norðanlondini, sum eisini høvdu krossmerki.

Í fyrstani varð tað kallað studentaflaggið. — — —

Ut vil jeg ut, og så langt, langt, langt over de høje fjelde.
Her er så knugende terende trangt,
og mit mot er så ungt og rangt,
.....

Soleiðis mundi og man so mangur kvøða. Tað hevur eyðkent so mangan góðan Føroying, at fegin vildi hann leita sær burtur, m. a. at útbúgva seg, ikki tí, at honum leiddist at vera heima; nei, teim flestu longdust heim aftur til landa.

Ein teirra, sum hevði sera góð evni og góðan hug at læra, og sum leitaði burtur úr vøkru bygd síni, var Jens Oliver Lisberg.

Eftir at hava lokið realprógv, fer hann saman við vinmonnum til Danmarkar at halda fram við lesnaði sínum. Men lagnan lagaði tað so, at hann, hesin evnagóði unglingi, mátti

(Framhald á 7. síðu)

Hækkaðar skaðabøtur hóast færri skaðamál

FØROYA VANLUKKUTRYGGING HEVUR SENT ÚT ROKNSKAP OG ÁRSFRÁGREIÐING FYRI FARNA ÁR.

Í FJØR VÓRU ÚTGOLDNAR SKAÐABØTUR FYRI TILSAMANS NÆRUM 900.000 KR. ELLA GOTT OG VÆL 100.000 KR. MINNI ENN Í 1967, HÓAST TALIÐ AV SKAÐAMÁLUM VÓRU 143 Í 1968 MÓTI 125 Í 1967.

RAKSTRARVINNINGURIN 529.256,59 KR. ER FLUTTUR TIL TILTAKSGRUNN

Limagjaldið hevur verið óbroytt síðani tað varð hækkað í 1963.

Viðv. skaðabótunum er tó broyting gjørd. Tær verða nú prístalsjavnaðar eina ferð árliga pr. 1. apríl við prístalinum 1. januar sum grundarlag. Lógin, sum kom í gildi 1. januar 1967, sigur, at fyri hvørji full 5 stig yvir ella undir 470 í føroyska prístalinum pr. 1. januar verður hámarks- og lágmarksstøddin á lógarlønini hækkað ella lækkað við ávikavist 125 kr. og 62,50 kr. og jarðarferðarhjálpin við 8 kr. Møgulig avlopsstig verða so goymd til næstu javning.

(Framhald á 7. síðu)

Sambandsmenn feldu jarðalógina

Í TRÝ ÁR HAVA MENN ARBEITT VIÐ EINUM UPPSKOTI UM NÝGGJA JARÐALØGGÁVU. HØSDAGIN VAR UPPSKOTIÐ TIL VIÐGERÐAR Á TINGI. HÓAST MEIRILUTI VAR FYRI TEIMUM FLESTU LØGARGREINUNUM, TÁ ATKVØTT VARÐ UM HVØRJA GREIN EINSÆRIS, FALL UPPSKOTIÐ

Í flestu førum var ein meiriluti J. Fr. Øregaard, J. P. Thomasen, Tummas Joensen og Sigurd Joensen) samdir, men ein minni luti (Pól Petersen og Vilhelm Nielsen) høvdu ymisk broytingaruppskot.

Hóast fittliga góða semju í nevndini, og hóast flestu av lógargreinunum vórðu samtyktar við stórum meiriluta av tinginum, hendi tað løgna, at samlaða lógaruppskotið ikki var samtykt.

Tað vóru serstakliga sambandsmenn, ið endaliga feldu uppskotið frá millumtinganevndini, ið arbeitt hevur við málinum.

Fyri uppskotinum atkvøddu 7 javnaðarmenn, 3 sambandsmenn í tjóðveldismaður og sjálvstýrismaðurin.
Eingin fólkaflokksmaður, 3 sambandsmenn, 3 tjóðveldismenn og Kjartan Mohr fordaðu fyri at vit fingu nýggja og meira tíðarhóskandi jarðalóggávu.

Ungfólk til Føroya

Ungmannanevndin hjá Norrøna felagnum skipar í døgunum 1.—8. juli, fyri ferð til Føroya.

Í Føroyum verður skipað fyri ungmananastevnu, har luttakarnir fáa høvi til at ogna sær vitan um ídnaðarlig, politisk, mentunnarlig og skúlaviðurskifti. Eisini verður skipað fyri tjaki um trupulleikar hjá føroyskum ungfólki.

Meginparturin av teimum sum koma til Føroya til stevnuna vera hýst privat.

EG trúði tað fall



KJARTAN MOHR
Stjórnarlimur í Sjónvarps felagnum.

Tá málið um stovnsetan av føroyskum sjónvarpi var til tríðju viðgerð á tingi seinasta mikudag fall tað, hóast tað var samtykt við aðru viðgerð.

Ein av teimum, sum greiddu atkvøðu fyri uppskotinum við aðru viðgerð, men sum ikki greiddi atkvøðu fyri tí við tríðju viðgerð, var Kjartan Mohr.

Sum grund fyri ikki at atkvøða fyri uppskotinum við tríðju viðgerð segði Kjartan Mohr var, at hann helt at málið fór ikki at verða samtykt, hóast hann greiddi atkvøðu fyri tí.

Føroya fólk kann tí vera ógvuliga erpi, at hava ein tílíkan støðufastan og ábyrgdarkendan mann millum teir 26 í løgtinginum.

BRÚÐLEYP

Í dag giftast í Keypmannahavn Greta Høj og Leivur Danielsen (fostursonur Oktaviu Nielsen, Tórshavn).

Adressan er Landsdommervej 7, 3. sal, København NV.